# Hálv-marathon í Reykjavík

Flogfelag Føroya skikpar í august mánaði fyri eini pakkaferð til Reykjavík, har hálvt marathon verður runnið. Fyrst og fremst er málbólkurin fyri hesum sonevndir motiónsrennarar, sum við hesum fáa eina eyka motivatión til at fara í renniskógvarnar. Sosisalur hugni og ein ítróttarlig uppliving er soleiðis málið. Ferðin byrjar fríggjadagin 17. august, og skal ferðalagið búgva á Fjørukrónni í Hafnafirði. Leygardagin er sjálv renningin á skránni, og hetta kvøldið verður eisini felags døgurði hjá luttakarunum. Síðani hava hesi møguleika at uppliva Ísland í nakrar dagar, áðrenn kósin aftur verður sett móti Føroyum týsdagin. Á Flogfelagnum siga tey, at ætlanin er, at tey tvær ferðir um árið skipa fyri uttanlandsferðum, har hálvmarathon er á skránni.




*Flogfelag Føroya skipar í august fyri eini pakkaferð til Reykjavíkar, har luttikið verður í hálvum maraton*



















